## Smart pisshús í Esbjerg

**Tað ljóðar sum skemt - eitt pisshús, sum kann koyrast niður í jørðina og takast uppaftur eftir tørvi**

HENTLEIKAR
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Men tað er ikki skemt, tí hálendska fyritøkan, Urilift, hevur fingið heimspatent uppá uppfinningina, og leygardagin verður fyrsta pisshúsið av hesum slagi á danskari grund tikið í nýtslu í Esbjerg,

Inni í húsinum, sum er gjørt úr rustfríum stáli, er eitt sokallað urinal, og tí er hesin nýggi hentleikin bara ætlaður monnum. Tað finst tó eisini ein útgáva, sum kann nýtast av kvinnum.

Húsið verður sett í ein kassa undir jørð og goymt undir loki um dagin. Tá so náttin fellur á, verður tað heysað upp í rætta brúkarahædd.

Ætlanin er, at húsið skal loysa ein illa luktandi trupulleika, sum kemst av, at nakrir menn halda, at vatnið kanst tú sleppa tær av við, nær sum helst og hvar sum helst.

Í Hálandi finnast longu 35 pisshúss av hesum slagi, og aðrir stórir býir hava eisini víst uppfinningini áhuga. Kostnaðurin liggur um eina fjórðingsmillión krónur.

*Kelda: Jyllands-Posten*

# Babyboom neyðugt í Danmark

**Sunnudagin kom ein kjakbók út í Danmark við heitinum, "13 udfordringer til velfærdssamfundet". Ein av høvundunum, Niels Ploug, sigur í bókini, at tað er alneyðugt, at danir komandi árini fáa ein skjótan vøkstur í barnatalinum**

MANNTAL OG ALDURSBÝTI
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Niels Ploug skjýtur upp, at foreldur undir 25 ára fáa tilboð um ókeypis barnaansing, og at fíggjarliga grundarlagið hjá ungum mammum verður bøtt við stuðli frá tí almenna.

Málið er, sambært Niels Ploug, at hækka fruktbærið úr 1,7 til 2,1 børn fyri hvørja kvinnu fram til ár 2020. Tølini vísa, at í sama tíðarskeiði fer talið á arbeiðsførum dønum at fella við 250.000, samstundis sum fleiri eldri verða at forsyrgja.

Við støði í tí, mælir hann politikarunum til at taka eftirlønina av og í staðin fremja eina broyting, sum fær talið á arbeiðandi oman fyri 60 ár at vaksa til tað dupulta.

Hann ákærir politikarar fyri at lumpa veljaran við at lata verða við at skjóta upp ábøtur av vælferðasamfelagnum, tí teir ræðast at tapa eitt komandi val.

Politikarar vita, at tað er neyðugt við broytingum, sum eru illa umtóktar, men tora ikki at siga tað, tí tað vildi verið tað sama, sum at gjørt politiskt sjálvmorð.

*Kelda: Jyllands-Posten*

# Matligheit skal valdast

**Ein hundur í Manchester mátti leggjast undir skurð, tí hann hevði etið ikki færri enn 28 golf-bóltar**

HUNDANS
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Sjefarahundurin Libby sleppur ofta til arbeiðis við eigara sínum, sum arbeiðir á einari golfbreyt.

Hundurin hevði fingið sær ta uppgávu at savna saman bóltar, sum lógu og rókust nær og fjar á vøllinum.

Tá hundurin fór at spýggja blóð, mátti eigarin til læknan við honum. Tað var ikki neyðugt hjá læknanum at koyra hundin í røntguna, tí hann hoyrdi bóltarnar skvambla í búkinum.

Hundaeigarin tók hetta ikki so tungt og hevur nú keypt hundinum einar tveir fótbóltar at spæla sær við í staðin.

Teir 28 bóltarnir verða nú goymdir sum eitt minni um, hvat kann henda, tá tú ikki kennir magamál.

*Kelda: BBC Online*

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 18, 2004
www.kaupthing.fo

# Góðir roknskapir stuðla partabrævagongdini

Røðan hjá amerikanska tjóðbankastjóranum Alan Greenspan, og góð búskapartøl, fingu í farnu viku renturnar á lánsbrøvum at hækka. Partabrøv stóðu seg eisini væl og góðir roknskapir frá fleiri av teimum stóru virkjunum stuðlaðu undir gongdina.

Tjóðbankastjórin er framvegis varin at døma um betur útlit á arbeiðsmarknaðinum. Hóast eina góða arbeiðsmarknaðarfrágreiðing fyrr í mánaðinum er enn langt upp til tær tvær milliónirnar av arbeiðsplássum sum fóru fyri skeyti undir búskaparafturgongdini seinastu trý árini. Hann gjørdi greitt, at tjóðbankin einaferð fer at hækka rentuna fyri at tálma inflatiónini sum fer at koma, um búskaparvøksturin heldur fram við somu ferð sum nú. Fríggjardagin vísti ein uppgerð í USA, at bíleggingar uppá varandi vørur fyri mars mánað vóru fimm ferðir størri enn mettar. Hesar hendingar í farnu viku, fingu partabrøvini og lánsbrævarenturnar at hækka, soleiðis at donsku 2 og 10 ára lánsbrævarenturnar nú liggja á ávikavist 2,61 og 4,37%, sum er hægsta stigi, síðan fyrst í februar. Eisini dollarin styrknaði og kostaði 6,31 kr. sum er hægsta stigi síðani novembur. Ein rentuhækking í USA nærkast tí, men vil í fyrsta umfari ikki ávirka renturnar um okkara leiðir, men sum frálíður vil rentan hjá okkum fylgja teirri amerikonsku.

Nú gott 20% av amerikonsku virkjunum hava lagt roknskapirnar fram fyri fyrsta ársfjórðing, kann staðfestast at 89% av roknskapunum hava verið á sama stigi ella betri enn væntað. Tað er hugaligt at síggja, at góðu úrslitini ikki bert stava frá sparingum, men eisini frá øktari sølu. Heldur góða gongdin fram, er eisini líkt til, at hon fær góða ávirkan á partabrævamarknaðin.

Roknskapurin hjá LM Ericsson vísti at sølan í fjør vaks 9%. Søla og úrslit fyri fyrsta ársfjórðing í ár vóru væl betur enn væntað. Kursurin seinasta árið er hækkaður heili 300% og liggur nú á 23,8.

Hesa vikuna koma rokniskapir frá Jyske Bank, Nordea, Novo o.ø. Av útlenskum roknskapur vera roknskapir frá ma. Boing, Lockheed M. lagdir fram.

Rentur

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,61% | 0,10% |
| 5 ára lánsbræv | 3,70% | 0,11% |
| 10 ára lánsbræv | 4,37% | 0,09% |

Partabrævavísitøl

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 264,4 | 1,2% |
| OMX, Svøríki | 714,8 | -0,2% |
| DJ Stoxx 50, Evropa | 2.793,0 | 1,0% |
| S&P 500, USA | 1.140,0 | 0,4% |

Íløgufeløg

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 104,64 | 0,2% |
| Evru Lánsbrøv | 165,73 | 0,0% |
| Norrøn Partabrøv | 80,46 | 0,9% |
| Altjóða Vøkstur | 66,69 | 0,5% |

Gjaldoyru

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 630,99 | 1,9% |
| EUR | 744,12 | 0,0% |
| GBP | 1.119,24 | 0,0% |
| NOK | 90,29 | 0,4% |

*Renta og kursir kl. 10 í gjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*



# Frá dómadagstalu til himmalskan einglasong

**Tjóðveldistingmaðurin, Tórbjørn Jacobsen, vil hava at vita frá landsstýrismanninum, Bárði Nielsen, hvør orsøkin er til, at hann nú brádliga hevur skift hugsan um føroyska búskaparstøðuna**

MUNNLIGUR FYRISPURNINGUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Niðurgongdstíð ella uppgongdstíð í føroyska búskapinum. Hesum sleppur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Bárður Nielsen, at greiða nærri frá á tingsins røðarapalli seinnapartin í dag.

Í viðtalu við Sosialin leygardagin, greiðir landsstýrismaðurin í fíggjarmálum frá, at gongdin í føroyska búskapinum er við at kvinka upp eftir. Seinastu mongu mánaðirnir hevur verið at hoyrt, at vantandi fiskaprísir og ILA-sjúkan hava havt við sær, at føroyski búskapurin gongur verri tíðum ímóti.

Útsøgnin hjá landsstýrismanninum leygardagin kom tí óvæntað , tí hon stríðir ímóti teimum útsøgnum, sum hava verið um føroyska búskapin seinasta árið.

Viðtalan við Sosialinum hjá Bárði Nielsen um føroysku búskaparstøðuna hevur fingið tjóðveldistingmannin, Tórbjørn Jacobsen upp úr stólinum.



*Tjóðveldistingmaðurin, Tórbjørn Jacobsen, vil hava at vita, hví Bárður Nielsen brádliga hevur skift áskoðan um føroysku búskaparstøðuna*

*Mynd: Savnsmynd*

### Andsøgn

Tórbjørn Jacobsen vil fegin hava at vita frá Bárði Nielsen, hvussu tað ber til, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum brádliga hevur broytt áskoðan viðvíkjandi føroysku búskaparstøðuni.

Tjóðveldistingmaðurin vísir á, at Bárður Nielsen fyri fáum døgum síðan alment hevur givið til kennar, at búskaparliga niðurgongdstíðin er byrja í Føroyum og hetta stríðir ímóti útsøgnini í Sosialinum leygardagin, har hann sigur, at føroyski búskapurin kvinkar upp eftir.

Fyri at fáa greiðu á málinum hevur Tórbjørn Jacobsen orðað ein munligan fyrispurning til landsstýrismannin í fíggjarmálum:

- Fyri einum mánaða síðani segði landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, í einum tíðindaskrivi, at nú var búskaparliga niðurgangstíðin byrja í Føroyum. Í viðtali við Sosialin leygardagin sigur sami landsstýrismaður m.a. at metingarnar nú vísa at inntøkurnar hjá landskassanum fara at kvinka uppeftir aftur í komandi ári, kann landsstýrismaðurin siga okkum hvør orsøkin er, og hvat ið grundarlagið er undir hesum sjaldsama signalforvirringi?

## Skiparin gjørdi sítt

Tað er Skipafelag Føroya sum er umboðsmaður fyri nógv umrødda farmaskipið, Green Summer, sum seinastu dagarnar hevur umskipað fisk frá russiskum skipum á Nólsoyarfirði.

Tað var kortini ikki umskipanin av fiski hjá Green Summer, sum vakti størstan ans í føroysku fjølmiðlunum í gjár. Tað kom fram í ljósmála, at skiparin á enska farmaskipinum hevði havt tríggjar nigeriubúgvar sum fangar í tríggjar vikur.

Sum skilst hava teir tríggir Nigeriubúgvarnir verið innilæstir í einum kamari í fleiri vikur og heilsustøðan var ikki hin besta, tá teir komu í land í Føroyum leygardagin.

### Rætt

Árni Dam á Skipafelagnum hevur havt samband við pólska skiparan fleiri ferðir. Árni greiðir frá, at pólski skiparin metir seg ikki hava borið seg skeivt at í málinum.

Hann heldur hinvegin seg hava fylgt øllum røttum mannagongdum í samband við mál av slíkum slagi. Árni Dam leggur afturat, at hesum hevur pólski skiparin eisini gjørt føroysku myndugleikunum greitt.

Skiparin á Green Summer royndi bæði í Hollandi og Portugal at lata nigeriubúgvarnar til myndugleikarnar, men hvørki myndugleikarnir úr Hollandi ella Portugal vildu taka ímóti teimum. Eftir fleiri vikur eydnaðist tað loksins enska skipinum at lata nigeriubúgvunum til føroyskar myndugleikar leygardagin.

Mánakvøldið fór enska farmaskipið, Green Summer, úr Nólsoyarfirði og setti kós móti Nigeria.

**páll**

# Afrikanararnir av landinum mikudagin

**Tveir føroyskir løgreglumenn fara at fylgja teimum trimum nigeriubúgvunum av landinum seinnapartin mikudagin**

FARVÆL
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*




Tað varð ein stokkut vitjan í Føroyum av teimum trimum nigeriubúgvunum á hesum sinni. Leygardagin komu teir av skipinum, Green Summer, har teir hava sitið fangar seinastu vikurnar.

Teir gjørdu eina roynd at fáa uppihaldsloyvi í Føroyum, men Útlendingarstýrið í Danmark avvísti umsóknina. Seinnapartin mikudagin fara teir tríggir av landinum, har leiðin gongur aftur til heimlandið, Nigeria.

### Føroyingar við

Tveir føroyskir løgreglumenn fara at fylgja teimum trimum nigeriubúgvunum til Danmarkar. Danska løgreglan tekur síðan yvir og fylgir monnunum aftur til Nigeria.

Seinnapartin týsdagin skuldu teir tríggir fyri Føroya rætt, har uppihaldið í Føroyum skuldi leingast til mikudagin.

- Útlendingar hava rætt at koma fyri ein dómari eftir 3 samdøgur, eftir at frælsi er tikið frá teimum. Vit tóku teir leygardagin og tískil eru trý samdøgur farin týsdagin. Tá ætlanin er at senda teir av landinum fyrst mikudagin, er røtt mannagongd at teir koma fyri ein dómara týsdagin, greiður Bergleif Brimvík frá.